


*Manningin á seinasta Maersk Air flogfarinum í Føroyum. Tvær av flogternunum eru føroyskar*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Eitt tíðarskeið er endað



*Á ársdegnum eftir at hann tók við sum stjóri í Maersk Air, steðgaði Finn Øelund Føroyarutuni hjá felagnum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Tá flogfarið hjá Maerska Air lætti av flogvøllinum í Vágum beint eftir middag leygardagin, endaði eitt 33 ára langt tíðarskeið í flogsøgu Føroya**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

**Vágar:** Føroyar eru strikaðar av rutunetinum hjá Maersk Air, eftir at felagið hevur flogið fast millum Danmark og Føroyar í meira enn 33 ár.

Við seinasta rutuflogfarinum hjá Maersk Air úr Vágum umleið klokkan hálvgum eitt leygardagin, endaði eitt tíðarskeið í føroyskari flogsøgu.

Skipað varð fyri samkomu í hangarinum á flogvøllinum fyrrapartin, har umboð fyri Maersk Air og Atlantic Airways, sum nú einsamalt fer at røkja alla flúgving til og úr Føroyum, vóru til staðar.

Stjórin í Maersk Air, Finn Øelund, segði í røðu sini, at høvuðsorsøkin til, at Maersk Air nú gavst við flúgving síni upp á Føroyar, partvís er, at leiðin er ein koncessiónsleið. Tað vil siga, at ikki er loyvt at kappast um prísir á leiðini, ella at tillaga kapasitetin eftir ynski.

Ein onnur grund er tann stutti vøllurin, sum er í Vágum, ella sum Finn Øelund málbar seg:

»...dels fordi der mangler et par meter ekstra på landingsbanen, så ruten kunne betjenes med B737-700 fly, som er det fly, vi ønsker vor flåde skal bestå i de nærmeste år.«

Triðja orsøkin til,at Maersk Air gevst nú, er sambært Finn Øelund, at felagið kláraði ikki kappingina við Atlantic Airways.

Atlantic Airways hevur verið dugnaligt og tikið nógvar kundar frá Maersk Air, segði Finn Øelund í røðu síni. So hann sannaði gamla orðafellið, sum segii, at um tú ikki klárar at vinna á mótstøðumanninum er best at samstarva við hann. Og tað hevur Maersk Air so valt at gera, segði hann.

Atlantic Airways og Maersk Air hava gjørt eina samstarvsavtalu, sum í høvuðsheitinum ber í sær, at ferðafólk úr Føroyum, sum skulu víðari suður í Europa, sleppa at keypa bíligar ferðaseðlar, um tey ferðast víðari við Maersk Air úr Danmark.

Finn Øelund vónaði, at einir 15.000 føroyingar árliga fóru at nýta hendan møguleikan, segði hann í røðu síni.

Hann endaði røðu sína við at takk teimum kundum, sum flogið hava við Maersk Air hesi árini. Hann takkaði føroyskum og donskum politikarum, sum hava gjørt tað møguligt hjá Maersk Air at flúgva hesi árini. At enda ynskti hann Føroyum og Atlantic Airways góða eydnu við nýggju møguleikunum og vónaði skjótt at síggjast aftur á ferð niður í Europa.

Mafgni Arge, stjóri á Atlantic Airways, rósti Maersk Air fyri tað arbeiðið, felagið hevur gjørt í samband við flúgving til Føroya. Hann fegnaðist eisini um samstarvið, nú er gjørt millum flogfeløgini bæði.

Finnbogi Niclasen, flogvallarovasti tók eisini orðið á samkomuni. Hann nam við søguna hjá flogvøllinum og flúgving til og úr Vágum hesi árini, Maersk Air hvur flogið higar.



*Brandbiarnir á flogvøllinum gjørdu heiðursportur, tá Maersk flogfarið lendi seinastu ferð í Vágum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



# Feðgar á ferð

**Feðgarnir Niels og Lars Helmøe Larsen vóru ávikavist skipari og stýrimaður á seinasta Maersk Air flogfarinum, sum var á rutuferð í Vágum**

FLOGFERÐA
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

**Vágar:** Tað var ein rættilig familjuferð, tann seinasta, sum Niels Helmøe Larsen, flogskipari hjá Maersk Air, gjørdi til Føroya leygardagin.

Sum stýrimann hevði hann sonin Lars. Og millum feðrafólkini var umframt konur og børn hjá teimum báðum, eisini fyrrverandi stjórin í Statens Luftfartsvæsen, Børge Helmøe Larsen, sum er faðir skiparan og abbi stýrimannin.

Á samkomuni, sum hildin varð í hangarinum leygardagin, heiðraði Uni Danielsen, stjóri á Flogfelg Føroya, sum í fleiri enn 30 ár var aðalumboð hjá Maersk Air í Føroyum og øll árini, til Maersk Air gavst at flúgva, hevur avgreitt flogførini hjá felagnum í Føroyum, gamla skiparan hjá Maersk Air, sum nú leggur frá sær fyri aldur.

Hesin seinasti túrurin hjá Maersk Air í Føroyum var eisini seinasta flogtúrurin hjá tí royndasta flogskiparanum á Føroyaleiðini yvirhøvur.

Niels Helmøe Larsen var fyrstu feðr í Føroyum sum stýrimaður á einum Sterling flogfari í 1970. Áðrenn Maersk Air byrjaði at flúgva higar.

Síðan hevur hann flogið góðar 1.800 tímar aftur og fram millum Danmark og Føroyar. Seinnu árini hevur hann av og á havt sonin, Lars, við sær sum stýrimann. Soleiðis var eisini hendan dagin, teir vóru og søgdu farvæl.

Uni Danielsen handaði Helmøe, sum hann vanliga verður nevndur í Vágum, eina gávu, sum myndaði innflúgvingina yvir Sørvágsfirði. Ein mynd, sum Helmøe kennir rættiliga væl, segði hann.

*Faðir og sonur í stýrihúsinum. Niels og Lars Helmøe Larsen vóru skipari og stýrimaður á seinasta túrinum hjá Maersk Air í Føroyum. Helmøe, sum skiparin vanliga verður nevndur í Vágum, hevur flogið meira enn 1.800 tímar á Føroyaleiðini*
*Mynd: Jens Kr. Vang*






*Flogskiparin hevði familjuna við á seinasta túri sínum sum flogskipari*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Ein brølari

**Tað er sjálvgjørt, at Maersk Air hevur mist so nógvar kundar á Føroyaleiðini, at felagið nú noyðist at gevast at flúgva higar, ásannar stjórin í danska flogfelagnum**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

**Vágar:** Tað var ein brølari av Maersk Air at fara undir bonusskipanina, har ferðafólk kundu savna stig og soleiðis møguliga vinna eina ferð til eitt nú Athen ella Paris.

Tað ásannaði Finn Øelund, tá hann á tíðindafundi í Vágum leygardagin fekk spurningin.

Hendan skipanin, sum Maersk Air tá setti í gildi, varð beinanveg svarað aftur av Atlantsflogi, sum setti sína Súluskipan í verk.

Tað gjørdi so, at fólk vórðu noydd at velja felag. Og føroyingar valdu Atlantsflog. Í so stórum tali, at tað veruliga merktiskt hjá Maersk Air.

Tá tú fyrst hevur fingið eitt stempul í bonuskortið, er tað rættiliga ótaktiskt at fara at keypa ferðaseðil við øðrum felag á somu flogleið. Tað sigur seg sjálvt. Og eingin ivi er um, at fólk, ið fyrr hava valt flogfelag, sum best bar til, fóru at ferðast við Atlantsflog burturav, eftir at hendan skipanin varð sett í gildi.

– Jú, tað var ein brølari, sum týðuliga sást aftur í minkandi ferðafókatali, ásannaði Finn Øelund, stjóri í Maersk Air, tá hann var i Vágum og segði farvæl leygardagin.




*Samkoma varð hildin í hangarinum í samband við, at Maersk Air gavst at flúgva til Føroya*

*Mynd: Jens Kr. Vang*